## Ófriður í Madagaskar



Misnøgd við stjórnina hevur elvt til ógvusligan ófrið í høvuðsstaðnum í Madagaskar, Antananarivo. Í gjár gingu fleiri túsund fólk kravgongu í miðbýnum. Tey settu eld á kringvarpshúsini og kravdu, at stjórnin, sum Marc Ravalomananas, forseti, hevur tilnevnt, skal leggja frá sær í stundini. Myndugleikarnir siga, at tvey fólk hava latið lív í ófriðinum, men fjølmiðlarnir vilja vera við, at minst ellivu fólk lógu eftirá í gjár. Tíðindastovurnar vænta, at ófriðurin fer at halda fram, tí fleiri fakfeløg eru farin í verkfall fyri at leggja størri trýst á stjórnina og forsetan.

## Rockstjørna løgd undir eldáseting

Myndugleikarnir í Teilandi hava nú skuldsett ein kendan tónleikara fyri at hava sett eld á ein náttklubba í høvuðsstaðnum Bangkok gamlaárskvøld. Náttklubbin kolaðist upp, og 64 fólk doyðu. Meiei enn 200 máttu á sjúkrahús við brandsárum. Tann 28 ára gamli, sum spælir í einum teilendskum rockbólki, er tann sætti maðurin, sum er tikin og skuldsettur í sambandi við eldsbrunan. Løgreglan sigur, at alt bendir á, at eldurin kyknaði, tí onkur brúkti fýrverk inni í náttklubbanum.

# HPV koppseting kann bj



*Gunnvá Hansen kendi einki til HPV virussið, sum elvir til krabbamein í lívmóðurhálsinum, tá hon fyri tveimum árum síðan fekk staðfest sjúkuna. Hon noyddist at taka burtur lívmóðurina. - Tað má vera tryggjandi fyri mammur og ommur, har sjúkan til dømis er arvalig, at tær kunnu tryggja sínar døtur og ommudøtur móti sjúkuni. Ókeypis koppseting skuldi sjálvsagt verið eitt tilboð til allar gentur, sigur hon*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ikki ráð at lata vera

**Føroya Felag móti Krabbamein metir koppsetingina móti HPV virussinum vera av alstórum týdningi. Krabbamein hevur bæði menniskjansligar og peningaligar avleiðingar við sær, og tí hevur landið ikki ráð at lata vera við at koppseta móti sjúkuni**

KRABBAMEIN

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Tølini yvir kvinnur, ið gerast sjúkar av krabbamein í lívmóðurhálsinum, eru høg í Føroyum, samanborið við okkara grannalond. Hví er óvist. Men Føroya Felag móti Krabbameini vísir á, at tað er av alstórum týdningi at føroyskar gentur vera koppsettar móti HPV virussinum, ongantíð ov tíðliga. Ein millión er fyribils sett av á fíggjarlógini, men kunngerðin er ikki komin enn, sum sigur hvussu farast skal til verka.

- Føroya Felag móti Krabbameini mælir til at 12 ára gamlar gentur vera koppsettar, umframt uppfylging av aldursbólkinum gentur 13-15 ár. Men av tí at bert tann eina milliónin verður sett av, er tað kanska skilabest at taka tær 13-15 ára gomlu fyrst, og síðani at fara í holt við tær 12 ára gomlu frá næsta ár, sigur Jansy Gaardlykke, dagligi leiðarin á Føroya Felag móti Krabbameini.

HPV koppsetingin verjir mótir tveimum av sløgunum av HPV virussinum, sum koma oftast fyri í krabbameinstilburðunum í lívmóðurhálsinum. Krabbamein í lívmóðurhálsinum rakar oftast ungar kvinnur, yngri enn 45 ár. Sum er, kunnu gentur lata seg koppseta móti virussinum, men hendan koppsetingin kostar á leið 3-4.000 krónur.

- Tað ger, at tað eru bert tey vælbjargaðu hava ráð til koppsetingina, og tað er ikki rætt. Við tað at mann letur hesa koppsetingina ókeypis til allar gentur, sparir landið í seinna enda nógvan pening í viðgerðum. Harafturat hevur krabbamein stórar menniskjansligar avleiðingar fyri familjulív. Alt talar sostatt fyri ókeypis koppseting av ungum gentum. Vit hava snøgt sagt ikki ráð at lata vera, sigur Jansy Gaardlykke.




*Tølini, sum Krabbameinsfelagið kann vísa á, vísa at krabbamein í lívmóðurhálsinum kemur oftari fyri í Føroyum enn í okkara grannalondum. Tað er óvist hvør orsøkin er*